# Van Nistelroy til HSV

Í eina tíð hevur spanska stórfelagið, Real Madrid, havt í umbúna at sloppið sær av við 33 ára gamla hollendingin, Ruud van Nistelroy, og nú sær út til, at hann fer at skifta til týska Hamburger SV. Spanska blaðið, Marca, vil vera við, at van Nistelroy longu hevur verið til læknakanning, so ein sáttmáli skal longu vera komin mestsum undir land og nú eru tað bara formalitetir, ið resta í.



# Babel umhugsar Birmingham

Ryan Babel, sum mest av øllum líkist einum lidnum manni í Liverpool, umghugsar at taka av einum tilboði frá Birmingham, sum hollendingurin fekk fyrr í mánaðinum, men tá ikki hevði áhuga fyri. Nú er støðan ein onnur, tí eingi útlit eru fyri spælitíð til Babel í Liverpool. Birmingham er tó ikki einasti møguleikin, tí eisini týsku feløgini Hoffenheim og Stuttgart sigast liggja framvið.



## TODI FODBOLDCOACHING...

tilbyder børn, unge samt elitespillere, en personlig træning med henblik på individuel udvikling af tekniske færdigheder, sportslig motivation og selvtillid.
Træninge forgår one on one med Todi Jónsson selv, og skal ses som et supplement og ikke en erstatning for spillerens øvrige klubtræning.
Med afsæt i spilleren og i samråd med træneren eller forældrene skræddersyer Todi spillerens træningsforløb, så han eller hun kan identificere sit talent, sit potentiale og anvende disse styrker til fulde.
Første træning indledes med ½ timers samtale, hvor gensidige forventninger til træningen drøftes. Her tages hensyn til spillerens alder, niveau og fodboldforståelse, og først derefter sættes et realistisk mål, og træningen struktureres med dette mål for øje.
Hos TODI FODBOLDCOACHING er det ikke alene præstationerne på banen der fremelsker. Motivation, tro, gejst og selvtillid er parametra, der udgør grundstammen for succes, og bliver bragt i spil, så den personlige udvikling opnås på flere planer.

Av heimasíðuni www.fodboldcoaching.dk





# Todi brynjar Jákup til Liverpool

**– Dreymurin er at spæla við Liverpool.**

**Jákup Vatnhamar Olsen er ein teirra, sum hevur tikið lut í Todi Fodbold Coaching um vikuskiftið. Treiskur og ágrýtin vandi hann saman við Toda Jónsson á ovara vølli í Gundadali sunnudagin. Hann venur dúgliga fyri at røkka sínum dreymi: At spæla við Liverpool.**

**– Todi er serstakliga fittur. Eg havi lært nógv. Í dag vandu vit skot, kordinatión og at skalla, sigur 13 ára gamli Jákup Vatnhamar Olsen, sum vanliga spælur við Víkingi.**

**- uni**